# Tok koyrir í Fuglafirði

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin fleyr til gul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í stívt andøvsgul av landsynningi og regn. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Týsdagin andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og ælingur, men mikudagin minni vindur av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 11 stig.

**Á varmakeldustevnu ber til at seta seg í eitt tok, sum fer at koyra runt í Fuglafirði. Hetta er fyrstu ferð, at slíkt tok verður roynt á stevnuni**

TOK
*Eyðun Klakstein*

Føroyingar eru vælsignaðir við nógvum ferðingarháttum, men jarnbreytir ikki nakað, sum vit kunnu breggja okkum av.

Meðan vit kenna ferðing í toki frá útlandinum, líta vit í Føroyum á bilin, bussin ella ferjuna.

Í gamlari tíð vóru tað ikki damptok, sum førdu føroyingar kring landið, men tá mátti antin rógvar um firðir og sund ella gangast um fjøll.

Á varmakeldustevnu, sum verður hildin í Fuglafirði um vikuskiftið, verður gyltur møguleiki at koyra í toki á føroyskari jørð.

Men okay. Talan er nú ikki um eitt veruligt tok, men hinvegin eitt av smáu tokunum, sum nógv mugu hava upplivað í stuttleikaparkum uttanlands.



*Hetta tokið fer at koyra í Fuglafirði um vikuskiftið, men fuglfirðingar lovað, at tað fer at veittra við Merkinum og ikki Dannebrog*

### Tok á hjólum

Kappingin millum summarstevnurnar, sum eru vorðnar alt fleiri í tali seinnu árini, ger, at fyrireikarar royna at gera eitthvørt serligt á teirra stevnu, so fólk fáa hug at velja hana burtur úr stóru rúgvuni av stevnum og festivalum, sum eru í summartíðini.

Í Fuglafirði hava teir fingið eitt tok til bygdina, og hóast tokið koyrdi við donsku flaggi í gjár, so vissaðu tey í Fugalfirði øll um, at á stevnuni verður Merkið vundið á stong á tokinum á varmakeldustevnu.

Tokið klárar seg uttan skinnarar, tí tað hevur hjól á koyra á, og so er í grundini einki mark fyri, hvar tokið kann rulla í Fuglafirði. Tokið verður partur av tivoliøkinum, men tað fer at koyra eitt sindur runt kring tivoliøkið.

Tokið fer at koyra leygarmorgunin kl. 10.00, og síðani eru tivoli opið til á midnátt leygarkvøldið, og lagt verður fyri aftur sunnudagin kl. 14.00. Tá verður eisini hildið fram til á midnátt, tá flestu tiltøkini eru farin aftur um bak, og seinasti dansurin verður við popparum í Mentanarhúsinum.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | 18 |
| Halifax | 20 |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 15 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 22 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 15 |
| Keypmannah. | 20 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 27 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 33 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 34 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 14 |
| New York | 21 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 33 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1025 hPa. í útsynning úr Írlandi fer spakuliga í landsynning og ein hátrýstryggur til havið vestan fyri Føroyar verður yvir Føroyum leygardagin.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Bretsku Oyggjarnar fer móti Íslandi og brúgvalagið haðani verður við Føroyar sunnukvøldið.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/07 kl. $06^{00}$– 04/07 kl. $06^{00}$. Hitin í gjár: 10,7°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,3 mm – mált frá 03/07 kl. $06^{00}$–04/07 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í juli: 0,3 mm

...hvør sigur at vit eru sum onnur?
HESTPRENT
Spf.
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

25. juni: Mánin longst frá jørðini
29. juni: Tendring
4. juli: Jørðin longst frá sólini
7. juli: Fyrra kvarter
10. juli: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 5. juli | 11.53 | — | 10.53 | 23.14 | 11.08 | 23.29 | 01.33 | 13.53 | 02.33 | 14.53 | 10.08 | 22.29 | 09.08 | 21.29 | — | 12.08 | 00.48 | 13.08 | 11.38 | 23.59 | 00.33 | 12.53 |
| 6. juli | 00.14 | 12.35 | 11.35 | 23.56 | 11.50 | — | 02.14 | 14.35 | 03.14 | 15.35 | 10.50 | 23.11 | 09.50 | 22.11 | 00.29 | 12.50 | 01.29 | 13.50 | — | 12.20 | 01.14 | 13.35 |
| 7. juli | 00.56 | 13.31 | — | 12.31 | 00.11 | 12.46 | 02.56 | 15.31 | 03.56 | 16.31 | 11.46 | — | 10.46 | 23.21 | 01.11 | 13.46 | 02.11 | 14.46 | 00.41 | 13.16 | 01.56 | 14.31 |
| 8. juli | 02.06 | 14.42 | 01.06 | 13.42 | 01.21 | 13.57 | 04.06 | 16.42 | 05.06 | 17.42 | 00.21 | 12.57 | 11.57 | — | 02.21 | 14.57 | 03.21 | 15.57 | 01.51 | 14.27 | 03.06 | 15.42 |
| 9. juli | 03.18 | 15.41 | 02.18 | 14.41 | 02.33 | 14.56 | 05.18 | 17.41 | 06.18 | 18.41 | 01.33 | 13.56 | 00.33 | 12.56 | 03.33 | 15.56 | 04.33 | 16.56 | 03.03 | 15.26 | 04.18 | 16.41 |

5 707265 100067 >